LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

VOLVO 740 TIL SØLU
við sóltaki, nýggj pikadekk, nýggjan kølara, koyrir sera væl. Til sølu fyri 3.500 kr.
Tlf. 254201

TOYOTA HIACE
L.H. 61, árg. 88, diesel, til sølu fyri 6.000 kr. Skal til umsyn.
Tlf. 216030

BMW 316
161000 km, sýnaður nov. 2002 árg. 1986, til sølu fyri 5000 kr.
Tlf. 441335

OPEL ASCONA 1.6
árg. 87, til sølu. Bilurin er í góðum standi mekaniskt, men er smávegis rustaður í botninum. Lættur at umvæla. Einans 5.000 kr.
Tlf. 375163

SPOYLARI TIL SØLU
vegna feilkeyp. Passar til Corolla 88-91.
Tlf. 511990

SPORTFELGUR
til Toyota til sølu. Nýggj heilársdekk fylgja við.
Tlf. 225398

SUBARU LEGACY ST.CAR
Vælhildin, hvítur, árg. 97, til sølu. Prísuppskot: kr. 75.000.
Tlf. 313513 ella 217644

OPEL KADET '84
Og nýggj 13" dekk til bilin. Bilurin krevur ymiskar smáar ábøtur. Nýggjar fjarðar til stoytdoyvara. Biliga til sølu 3000 kr ella hóskandi boð.
Tlf. 226789, spyr eftir Henry. Best aftaná kl 15

TIL SØLU
Seat Ibiza diesel (svartur) 1.9 sdi, árg. 07/2000 til sølu. Sportfelgur. Klimaanlegg er digitalt. Sera økonomiskur, men góða kraft. Sony cd box við 10 diskum digitalt instilla á frekvenz.
Tlf. 224789

NÝGGJ FORHURÐ
Høgra forhurð til Ford Escort til sølu fyri 700 kr.
Tlf. 210560

SUBARU YNSKIST TIL EYKALUTIR
Hevur tú ein Subaru 1.6 GL, typa AC2, árg. 86 biliga, so ring
Tlf. 210560

TOYOTA COROLLA 1.6i
árg. 96 til sølu. Bilurin sær gott út, við fylgja sportfelgur, pikadekk á felgum og gott Sony anlegg. Bilurin hevur koyrt 100.000 km. Prísin kunnu vit snakka um.
Tlf. 214762

VOLVO 240/244
árg. 1983, 1500 kr. Um áhugi er ring
tlf. 317471 ella 264074

FORD ESCORT TD
árg. 97, koyrt 96.000 km. Bilurin hevur sóltak, elrútar framman, cd-spælara og tokulyktir.
Tlf. 318417

OPEL ASTRA 1.7 TD
árg. 95, við sportfelgum, biliga til sølu.
Tlf. 228562 ella 423547

TIL SØLU
Toyota Corolla, árg. 95, er lutvíst afturgjørdur, verður seldur biliga.
Tlf. 504817 ella 213388

EIN MAZDA 323 BD
frá 1984 ynskist til keyps sum eykalutir.
Vinarliga ring 455728

TIL SØLU
Nissan King Cab 4x4D, árg. 11/96, koyrt 96.000 km. Nýsýnaður. Vetrardekk á felgum fylgja við. Sær gott út.
Tlf. 371386 ella 214032

OPEL COMBO
Ein fínur stampabilur til sølu fyri sámuligan pris.
Tlf. 448196 ella 252383

TIL SØLU
Tveir Mazda 323 GTI – tann eini hevur plátur og ein Nissan Cabstar, sum deilir, hevur gott hús.
Tlf. 225536

OPEL KADET
biliga til sølu.
Tlf. 448196 ella 252383

HEILÁRSDEKKK
4 brúkt heilársdekk, 175/70-14, við góðum mynstri biliga til sølu.
Tlf. 222939

VW PASSAT
árg. 87, eyka motorur kann fylgja við.
Tlf. 448349 ella 263497

FORLYKT
til Peugeot 306, árg. 96 ynskist biliga til keyps.
Tlf. 443114 ella 228671

CITROEN BX 19 GTI
16V 160 HK, árg. 90 til sølu fyri 3.000 kr. Hevur skaða, ongar plátur.
Tlf. 444807 ella 224108

HONDA ACCORD 1.8i LS
árg. 11.03.99 – hevur koyrt 80.000 km. Stereoanl., box til 6 fløgur, vetrardekk á felgum + sportfelgur við dekkum.
Tlf. 311230

GRØNUR BMW 324 DIESEL
Árg. 86. Bilurin hevur heilárseekk, 2 sett av sportfelgum og 1 sett av pikadekkum fylgja við. Eisini hevur hann oljufýring, el-spegl, sóltak, leðursportsetur. Bilurin er sera væl hildin. ring og hoyr nærri.
Tlf. 226772

HONDA CIVIC
Kølari til Honda Civic, árg. 89 til 91, ynskist fyri rimiligan pris.
Ring 251819

PEUGEOT 205
reyður við sportfelgum, árg. 1991, til sølu. Bilurin er í góðum standi.
Tlf. 211351

MAZDA 323 2.0 DIESEL
til sølu. Árg. 1998, koyrt 76.000 km pikadekk á felgum fylgja við. Verður seldur um nóg høgt boð fæst. Bilurin er at síggja á www.bil.fo
Tlf. 217107 ella 317107

FORD ESCORT 1.8
Turbo diesel, st.car, árg. 97 til sølu.
Tlf. 228649

MITSUBISHI LANCER
stw. til sølu. Árg. 89, hevur koyrt 144.000 km, sýnaður í aug.2002. Bilurin er í góðum standi. Sportfelgur fylgja við. Kostnaður 8.000,- kr.
Tlf. 315991 e-mail: lubos@kallnet.fo

TIL SØLU
Toyota Corrolla frá 87 til sølu.
Tlf. 210408

MAZDA 626 1.8
árg. 91, koyrt 155.000 km, prísur 20.000 kr.
Tlf. 313833 ella 220570

MAZDA 323
árg. 9/88 til sølu. Umvældur og nýsýnaður, ikki rustaður, økonomiskur. Góð pikadekk eru undir og góð summardekk á felgum fylgja við.
Tlf. 317626 ella 226711

YNSKIST
Eigur nakar ein Toyota Hilux 2.4D sum kann nýtast til eykadeilir.
Tlf. 451028

VOLVO 440
svartur, árg. 89, til sølu.
Tlf. 265621

FELGUR TIL SØLU
4 felgur 14" til Kia Zephia. Holavstandur 4 x 100 v/ summardekkum 500 kr. stk.
Tlf. 214405

TOYOTA CAMRY 2.0 XLI
árg. 87, v/ aut. gearum, bíliga til sølu. Sýnaður 05.12.02.
Tlf. 264505 ella 424652 eftir kl. 20

SKODA OCTAVIA TIL SØLU
Skoda Octavia ambiente 1.6i frá 06/2002 til sølu. Sera væl útgjørdur og økonomiskur, svartur á líti og sær út sum nýggjur. Bilurin hevur 4 stk. airbag, elrútar framman og aftan, klimaanlegg, ABS bremsur, elspegl við varma, powerstýring, innstilling av ratti, el-innstilling av forlyktum, trádleyst centrallás, tokulyktir, alarm, (ASR/EPS=elektroniskt stabilitetsprogrm.), multifunktiónsindikator, fartpilot. Bilurin hevur einans koyrt 2930 km. Ring og hoyr nærri á
tlf. 361514 ella 361364 eftir kl. 17

GOLFURIN
er nú til sølu. Kolasvart Hammerite lakk, spildurnýggjar 15" alufelgur og uppsnollaður innan og uttan. Prísuppskot: 15.000 kr. Ring og hoyr nærri.
Tel. 216886

TIL SØLU
Honda Accord 2.0, árg. 92 til sølu.
Tlf. 224896

EYKALUTIR
til Nissan Patrol 3.3 TD, árg. 87 til sølu og ein 2 soylaður lyftari við breki biliga til sølu.
Tlf. 223021

PEUGEOT 106
Diesel, árg. 1995, myrkabláur, til sølu.
Tlf. 228597

OPEL VECTRA 2.2 DTI
125 HK til sølu. Árg. 10/2000, koyrt 75.000 km, svart metallakk, aircondition, hita í forsetrum og eyka felgur.
Tlf. 423488 eftir kl. 18.00

VETRARDEKK
4 dekk á felgum, passa til Toyota Avensis, stødd 185/65 R15 til sølu fyri 1000 kr.
Tlf. 228408

Amboð

TIL SØLU
Lyftivognur til plattar til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 224910

TIL SØLU
Drejebænk til træ og stál drejning. Båndsav, Søjleboremaskine. Alustia 5 m.
Tlf. 442190

Arbeiði

STOYPIARBEIÐI
Er tað nakar, ið kann geva eitt tilboð upp á at stoypa garð rundan um hús í Sørvági.
Tlf. 333062 ella 223088

2 AU-PAIR YNSKJAST
Vit eru 2 familjur sum búgva við Mývatn í Íslandi og vit ynskja 2 góðar gentur, ikki yngri enn 19 ár, at koma at arbeiða hja okkum. Børnini í aðrum heiminum eru trý, 2 eitt ár gamlir dreingir og 1 fýra ára gomul genta. Í hinum heiminum er 1 trý ára gamal drongur. Tú mást hava koyrikort. Vit hava eisini íslendsk ross á heiminum. Vinarliga ring 00354-4644334 ella send
teldupost: haganes@mmedia.is

MASKINMAÐUR SØKIR KJANS
Søkt verður eftir avloysarakjansi sum maskinmaður ella dekkari. Alt hevur áhuga.
Tlf. 229405

MÁLARI
Hevur tú hug at koma til Sandavágs at mála hús í einari hædd. Tú kanst búgva í húsunum ímeðan.
Tlf. 322660 ella 260050

ARBEIÐI SØKIST
21-ára gamal maður søkir arbeiði. Eri vanur at arbeiða, havi m.a. verið arbeiðsmaður hjá timburmanni og málara. Eisini havi eg arbeitt á goymslu. Helst í Havn.
Tel. 265234

AU-PAIR Í AALBORG
Vit ynskja gentu í húsið at byrja skjótast til ber og fram til juli, møguliga longur. Vit hava serliga tørv á hjálp til at ansa hálvt ára gomlum barni.
Tlf. 310943

Barnaútgerð

VOGNUR TIL TVILLINGAR
Simo combivognur til tvillingar. Regnslag, flugunet, koyriposar og lyftir fylgja við.
Tlf. 373400 ella 250530

TIL SØLU
Lítið brúktur tvillingaklappstólur við regnslag til sølu.
Tlf. 373400 ella 250530

TIL SØLU
Hokus Pokus stólur til sølu.
Tlf. 310144

SIMO KOYRISTÓLUR
Myrkabláur við myrkabláum stelli, brúktur til eitt barn. Til sølu fyri kr. 2.000,- Nýprísur kr. 3.800,-
Tlf. 321650

BRITAX BILSTÓLUR
Britax bilstólur 0-13 kg. Vælegnaður til heilt smá børn 850,- kr. Beriseli Baby Dan 200,- kr. Puslikommoda 200,- kr.
Tlf. 229951

BARNASONG
Barnasong 120 x 60 cm. á hjólum, botnurin og onnur síðan kunnu justerast (flytast) til sølu fyri 600,- kr. Nýprísur 1700 kr.
Tlf. 317564

BARNAVOGNUR
Bláur barnavognur við puslitasku til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 317564

TIL SØLU
Bilstólur Maxi Cosi 0-10 kg. Skrástólur. Systkinasetur at seta á vogn
Tlf. 262161

TIL SØLU
Ein myrkabláur Silver Cross barnavognur við babylift til sølu.
Tlf. 374243 ella 227533

Bátaútgerð

GLASTREVJABÁTUR TIL SØLU
27 fót glastrevjabátur í góðum standi, klárur til fiskiskap til sølu fyri 380.000 krónur ella hægstbjóðandi.
Áhugað kunnu ringja 228856

YNSKIST
2 hálvautomatiskar oljutýstsnellur fyri max. 3000 kr. stk. Um tú hevur slíkar, so vinarliga ring
424248 eftir kl. 18

SNELLUR
5 stk. elektriskar snellur – Beltronic BZ 5000 – til sølu. Snellurnar eru 2 ára gamlar og í góðum standi.
Tlf. 373576

AVI 27
Góður snellubátur við allari útgerð. 90 HK Volvo - uttan fiskiloyvi til sølu fyri 285.000 kr. Áhugað ringi til
Tlf. 318649 ella 229088 Oddmar Samuelsen

GAMALT 6-MANNAFAR
við fiskiloyvi í bólki 5D ynskist til keyps.
Tlf. 221866

Bingo

HEIMABINGO
Hesi hava vunnið í heimabingo hjá VB: 373628, 373808, 370828, 373845, 373618, 373394, 374020, 373201, 373261. Takk fyri stuðulin.
VB

TVØROYRAR KLUBBI
Bingo verður í Tvøroyrar Klubba tórskvøldið 6. mars kl. 19.30.
Nevndin

HEIMABINGO
Spæl heimabingo og vinn eina uttanlandsferð við nýggju Norrønu. Send bingoplátuna inn áðrenn 1. mai. Drigið verður 15. mai 2003. Fáast til keyps um alt landið.
Bygdarfelagið Báran í Árnafirði

400 PÁSKAREGG
Hví keypa páskaregg, tá tú kanst vinna tey í Glæmuni leygardagin 22. mars kl. 15.00. 400 páskaregg eru at vinna. Kaffi og kakir verða eisini. Øll eru hjartaliga vælkomin.
KFUM skótarnir í Kvívík

BINGO
verður í EB-húsinu 10. mars kl. 19.30. Lutaseðlar verða seldir.
EB

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í skúlahøllini mánakvøldið 10. mars kl. 19.00. Hvørt bingo gávukort á kr. 300,00. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort á kr. 1000 í olju frá Statoil. Páskaregg burturlutað millum spølini.
Tvoroyrar Svimjifelag

SUÐUROYINGAR
Vit hava bingo í Framtíðini mánakvøldið 31. mars kl. 19.30 Nærri lýst seinni.
Kirkjukórið Ljómur

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður sunnudagin 9. mars kl. 16. Full pláta 400 kr. Høvuðsvinningur gávukort frá Smyril Line á 2000 kr. Eykaspælið 800 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

BINGO
verður í Stórhúshøll leygardagin kl. 16.00.
Í.F. Flogbóltur

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í Framtíðini 5. mars kl. 19.30. Nógvir góðir vinningar. Full pláta 300 kr. Á lutaseðli m.a. tvær ferðir 500 kr. Drigið verður millum spølini.
K.F.U.M. Skótarnir

KAGGIN
Gott páskabingo verður leygarkvøldið 29.3. Barnabingo kl. 15 og vaksin kl. 19. 15 vinningar á lutaseðli m.a. 2 gávukort á 1.000,- og 1 á 1500,-. Eisini verður spælt bingola og 20 kr. spæl.
Kaggin

GOTT BINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum 6. mars kl. 19.00. 6. og 12. spæl 600 kr. Á lutseðli m.a. páskaregg, gávukort á 2 x 500 og 1 x 1000 kr. Páskaregg millum spølini, eykaspæl, koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
AB-stuðlar

GOTT BINGO
verður í Glæmuni í Kvívík leygardagin 15. mars kl. 16. 12 plátur 100 kr. Drigið verður millum spølini. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Burturm. /funnið

2 LYKLAR
í sama bandi funnir í busskýlinum í Skálafirði 26. februar.
Tlf. 448173 ella 218173 eftir kl. 18

TURRIKLÆÐI BURTURMIST
Svart, ullint turriklæði burturmist í Sjónleikarhúsinum 15. febr 2003. Um onkur hevur funnið tað, vinarliga ring
Tlf. 310942 ella 225020

EG SÓKNIST
eftir einari gráari »Havnar Fimleikarfelag« tasku, ið varð stolin uttan fyri Mentunarhúsið í Fuglafirði tann 15. feb. Um tú hevur sæð hana, vinarliga ring
tlf. 255905 ella 319897

HVØR EIGUR?
Vit hava funnið eina hvíta kanin við brún/svørtum oyrum. Hvør man eiga hana? Funnin á Traðartún, fríggjakvøldið 21. februar. Um tit sakna eina kanin, so vinarliga ring
tlf. 316502

Býli

HÚS Í SVANGA TIL LEIGU
frá 1. apríl. Útleiga verða miðhædd og loft (120 fermetrar) við atgongd til vaskirúm. Loft: 3 kømur, hjúnarúm og baðirúm. Miðhædd: Stova, køkur og grovkøkur, hjallur og wc. Rúmlig hús. Gótt útsýni, nær við býin. Barnavinarligt umhvørvi. Møguleiki er at yvirtaka húsini fyrr. Leiga smb. avtalu og 2 mán. dep.
Ring 318600 ella 251171

HANDILSHØLIR
Handilsholir til leigu í miðbýnum í Havn. Eisini hóskandi til goymslu, verkstað ella íbúð. Kostnaður 4.000 kr. um mán, við varma, men uttan el.
Tlf. 756726 best eftir kl. 16.00

ÍBÚÐ SØKIST Í HAVN
Fari væl um og gjaldi til tíðina.
Tlf. 319689 ella 226262

STÓR ÍBÚÐ SØKIST
í Havn til eitt ungt par. Fara væl um og gjalda til tíðina. Max 6.500 við ljós og varma.
Tlf. 252345

LÍTIL ÍBÚÐ SØKIST
í Havn til 33 ára gamla kvinnu við einum 3 ára gomlum soni. Fari væl um og gjaldi til tíðina.
Ring 258172

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Genta 31 ár, søkir 1-2 verilsis íbúð í Keypmannahavn til leigu ella andeil.
Tlf.0045 21946615

HØLI YNSKIST
Høli, minst 25 fermetrar ynskist til leigu. Skal brúkast til undirvising og venjing av tónleiki.
Tlf. 226242

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungt par søkir íbúð skjótast gjørligt í Havn ella nærhendis. Vit roykja og drekka ikki. Vinarliga ring á
tlf. 312688 ella 265595

YNSKIST TIL LEIGU
Par síðst í 20unum ynskja íbúð ella hús til leigu. Ikki roykjarar. Má gjarna liggja uttan fyri Havnina. Max. prísur: 4000,- kr. við hita og el.
Tlf. 222953 ella 421441 eftir kl 19.00

HJÄLP
Lägenhet søkes omgående i Torshavn av svensk par som inte har någonstans att bo.
Tlf. 264626, Sara

PAR
ið hevur verið í lestrarørindum í Danmark, ynskir íbúð í Tórshavnar kommunu skjótast gjørligt ella eftir 1. mai.
Tlf. +4532886551, fart.: +4522505065

SOS
Vit eru tvær ungar gentur, ið sóknast eftir eini íbúð í Havn, má hava 2 kømur! Vit hava báðar fast arbeiði og gjalda til tíðina. Vinarliga ring
á tlf. 224608 ella 256404

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Lítil íbúð til leigu frá 1. mars.
Tlf. 213388 ella 310767

PAKKHÚS TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst, er eitt pakkhús við bátahylin í Sørvági til sølu. Tvær hæddir á uml. 200 fermetrar.
Tlf. 333485 ella 332893

NEYÐARRÓP
Íbúð ynskist til unga gentu. Hevur brúk fyri eini íbúð í høvuðsstaðarøkinum. Hevur fasta inntøku. Vinarliga ring á
tlf. 506549

ÍBÚÐ ELLA KAMAR YNSKIST
20 ára gamal drongur søkir íbúð í Tórshavn. Eri friðarligur, fari væl um og gjaldi stundisliga.
Petur, tlf. 250896, arb. 311320

HÚS Í SVANGA TIL LEIGU FRÁ 1. APRÍL
Útleiga verða miðhædd og loft (120 fermetrar) við atgongd til vaskirúm. Loft: 3 kømur, hjúna- og baðirúm, miðhædd: stova, køkur og grovkøkur, hjallur og wc. Moguleiki er at yvirtaka húsini fyrr. Íbúð er í kjallahæddini. Leiga smb. avtalu tó minst kr. 7.500. (uttan el og hita). Dep. 2 mán. Ring
Tlf. 318600 ella 251171

ER TAÐ NAKAR,
ið hevur eina íbúð til leigu til ungan mann, ið skal byrja á Politiskúlanum í Keypmannahavn 01. des. 03.
Vinarliga Allan, tlf. 220494

HÚS TIL LEIGU
Lítil hús miðskeiðis í Havn til leigu sum skjótast. Prísur er kr. 6000 umframt el og hita.
Ringið 322326

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Nýggj íbúð í Hoyvík, 60 fermetrar, køkur og stova í einum, 1 kamar, wc og gongd, til leigu.
Bill.mrk. 1537-1

ÍBÚÐ SØKIST
Par við 2 børnum søkja íbúð í Havn. Má hava 2 kømur. Drekka og roykja ikki.
Tlf. 320624 ella 229951

HÚS ELLA ÍBÚÐ SØKIST
í Tórshavn, ella Suðurstreymoy.
Tlf. 222958

ÍBÚÐ SØKIST Í KEYPMANNAHAVN
3-4 rúms íbúð søkist í Keypmannahavn frá 1/4-03 til 1/4-04.
Tlf. 457507 ella 217507

HÚS YNSKJAST TIL KEYPS ELLA LEIGU
skjótast tilber, helst í Klaksvík. Leiguprísur: 5.000 kr. + ljós og hita. Ringi
Tlf. 757034 best eftir kl. 18.00

ÍBÚÐ SØKIST
32 ára gomul kvinna søkir íbúð í Havn.
Tlf. 229608 eftir kl. 16

HJÁLPI OKKUM
Vit skulu í skúla í august í Klaksvík. Er tað nakar, ið hevur eina íbúð at keiga einum pari frá august og árið út fyri ein sámuligan pris. Vit gjalda til tíðina. Ring á
Tlf. 224077 ella 361452

SØKT VERÐUR EFTIR
kamari ella íbúð.
Tlf. 217416

HÚS Í SØRVÁGI TIL SØLU
Nýinnrættað hús í Sørvági til sølu, um hóskandi boð fæst. Húsini eru totalrenoverað innan og uttan og eru sum nýggj.
Tlf. 332614 - 225090

Dansur

DANSIFRØI
hevur hugnakvøld 8. mars við luttøku úr dansifelagnum Fragdin úr Hósvík. Byrjað verður kl. 21.00
Nevndin

Dýr

EFTIRLÝSING
Hevur nakar sæð ein lítlan hvítan puddilhund í vikuskiftinum. Hann varð síðst sæddur í Sleipnirsgotu fríggjakvøldið 28. februar. Hann haltar á høgra bakbeini. Hevur tú sæð hann, vinarliga ring
tlf. 313002

UNDULATER
sælges.
tlf. 228058

DVÆRGPAPEGØJER
sælges.
tlf. 228058

KETTLINGAR
Vit eiga verðins fittastu kettlingar. Teir eru gráir og hvítir. tú kann gott fáa ein. Ring til okkum á
tlf. 449480

KANINUNGI
Ein kaninungi ynskist til keyps.
Tlf. 372268 ella mobil 224186, helst eftir kl. 18

STEÐGA
og hygg her! Heisan! Vit eru tveir super fittir marsvína hannar, og vit vóna at TÚ keypir okkum. So er hetta nakað fyri teg, so ring
tlf. 258367, 267369 ella 265170

AKVARIUM TIL SØLU
Akvarium 80 l. við øllum tilhoyri til sølu.
Tlf. 442067

KETTLINGAR
Tveir stak fittir, spakir og vakrir kettlingar (1 løða og 1 frensur) latast djóravinum. Teir eru 8 vikur gamlir.
Tlf. 318003 ella 311717

KANINIR KUNNU AVHEINTAST
3 kaninir kunnu avheintast av djóravinum.
Tlf. 757034

HEY ALLIR DJÓRAVINIR
Eg havi 4 fittar marsvínungar til sølu. Teir eru svartir og hvítir og sera fittir.
Tlf. 313123 eftir kl. 18.00

TIL SØLU
Eitt sera vælhildið hamstarabúr. Nógv ymiskt spennandi fylgir við. Stødd uml. 40x20 cm. 400 kr. Ring á
Tlf. 217802

Fundir

ÁRSAÐALFUNDUR
Kvinnuhúsfelagið hevur aðalfund hóskvøldið 20. mars kl. 19 í KFUM: Skrá sambært viðtøkum felagsins.
Kvinnuhúsfelagið

SUNDA PENSIONISTAFELAG
Aðalfundur verður í Eydnuni á Oyrarbakka mánakvøldið 10. mars kl. 19.00.
Nevndin

FRÁ FDF
Aðalfundur felagsins verður á Hotel Vágum 7. mars 2003 kl. 21.30. Skrá sambært lógum felagsins.
FDF

TVØROYRAR SVIMJIFELAG
Aðalfundur verður í kantinuni á posthúsinum tórsdagin 13. mars kl. 19.
Nevndin

ÁRSAÐALFUNDUR
hjá Heimaru helvt á Bjørgum í Vestmanna verður í hølum Arbeiðarafelagsins tann 16. mars kl. 15.00.
Nevndin

PENSIONISTAFELAGIÐ H.Ø.F.T.
Tvøroyri, hevur limafund í Øravík mikudagin 3. mars kl. 19.30. Møtið fjølment. Ringið eftir bussi.
Nevndin

PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN
kemur saman mikukvøldið 5. mars kl. 19.00 í Losjuni, Tinghúsvegur 18 til vanliga fund.
Nevndin

AÐALFUNDURIN
í Føroya Handverksmeistarafelag verður 31. mars 2003 kl. 13.00 í Vinnuhúsinum.
Nevndin

Húsarhaldstól

UPPVAKSIMASINA TIL SØLU
4 ára gomul Bauknecht til sølu fyri 1.500 kr. Nývirði 7.500 kr.
Tlf. 222222

LÍTIÐ BRÚKT UPPVASKIMASKINA
Av slagnum Bosch, er til 6 persónar, til sølu fyri 3.200 kr. Nývirði 5.000 kr. Ring á
Tlf. 217686 ella 317686

Innbúgv

YNSKIST
4 spisiborðsstólar, klassiskir, skulu vera myrkir, ynskjast til keyps.
Tlf. 255279

TIL SØLU
2 st Furu skáp med glas hurðar 1 m. 0,42 høg, 0,32 djup. Pris 200,- stk. 2 st. spnglamper í Furu pris 300,-. Hvit songbord pris 100,- kr. Badrumskáp brun nyggja pris 200,-. Duppelsong í Furu 2 x 80 bred 2 m. l. pris 400,- kr. Radiatorer El Dris 800 w hvit pris 400,- kr. stk. Flott sengtáppe endast 30,- kr. stk. El kabel 380w 6 m. 12 m. Pris 100,- stk. Lysrör Nyggja 36w 40w Pris 30,- stk. Coca Cola skylt komplett med rör pris endast 300 kr. Mycket Flotta barhurdar í Furu pris endast 1.400 kr. Nyggja Golvtáppe 8 kvm. farve antraeingrå pris 200,- kr. Rustfri Gryta 50 lit. pris 500,- kr.
Tlf. 449054

TELDUBORÐ
Smart telduborð 94 x 140 við glasplátu (keypt í Ikea) til sølu fyri 900,- kr.
Tlf. 316050

KØKSBORÐ TIL SØLU
Køksborð 120 x 80 við 4 betrektum stólum úr ljósum træi til sølu fyri 1000 kr.
Tlf. 255279

KØKSSTÓLAR TIL SØLU
6 lítið brúktir køksstólar til sølu fyri 350 kr. stk. Stólarnir eru úr ljósum træi, hava høgt rygglen og trektir við myrkareyðum smámynstrutum stoffi.
Tlf. 259105 ella 311895

SOVIBRÍK TIL SØLU
Sovibrík við madrassu og skuffum 80 x 200 biliga til sølu.
Tlf. 310144

TIL SØLU
Song við tveimun skuffum undir, til sølu fyri 300 kr.
Tlf 217118

KØKSBORÐ TIL SØLU
Fyri kr. 500,-. Nýprísur 2.000,-. Hvítt við stálbeinum 160 x 100. Brúkt í 3 ár. Vælhildið.
Tlf. 321650

BOXMADRAS
med bøjleben 90 x 200 cm. til salg. Ny, kun brugt í 2 mdr. Pris 1.000,- kr.
Tlf. 310952

DUPULTSONG
1.40 x 2.00 m fura við madrassum, einki brúkt, til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 747785

TIL SØLU
Sofa 2.20 m long - grá/brún 500 kr.
Tlf. 747785

TIL SØLU
Bóndabriks v/ madrass 90 x 200. Hvít song við madrass 90 x 200. Hvítt spísiborð v/ 3 stólum. Hvítt ovalt sofaborð biliga til sølu.
Tlf. 311149

SOFASETT
Sofasett 3+2 í leður til sølu. Prísur 1.500 kr.
Tlf. 320217

Leikur

HYGG HER!
Er tað nakar, ið hevur leikutoy, tey ikki brúka, eru tit vælkomin at geva okkum tað. Vinarliga Drotning Ingridar Barnagarður, J. Paturssonargota 13, Tórshavn.
Dr. Ingridar Barnagarður

Lutaseðlar

IKKI AVHEINTAÐIR VINNINGAR
Hesir lutir eru ikki avheintaðir enn: Nr. 840 Vikuskiftið fyri 2 á Klaksvíkar Sjómannheimi. Nr. 2681 El-ketil. Nr. 2485 El-strúkijarn. Um vinningarnir ikki eru avheintaðir í seinast lagi 15. mars fella teir aftur til Meinigheitshúsið.
Stýrið fyri Meinigheitshúsið í Vági

FRÁ FØROYAFELAG MÓTI KRABBAMEINI
Drigið varð 17. des. og lýst hevur verið í bloðunum, men lutaseðla-vinningurin nr. 13626 er ikki avheintaður enn. Vinarliga sigi frá innan 01.04.2003. Føroyafelag móti krabbameini, Grønlandsvegur 58
Tlf. 317659

Pløgg

TIL SØLU
Konfirmatiónskjóli við stuttum jakka std. 34 model Lilly til sølu fyri 900 kr.
Tlf. 257874

KONFIRMATIÓNSKJÓLI
og blondujakki str. 36 til sølu fyri 700 kr. Skógvar str. 38 til sølu fyri 200 kr.
Tlf. 422404

BLÁ MANNFÓLKATROYGGJA
til føroyska búnan stødd uml. 16 ár til sølu fyri 1.000 kr. uttan knappar.
Tel. 260967 ella 449267

KONFIRMATIÓNSKJÓLI
jakki, stødd 38 av merkinum Lilly og hvítar sandalir nr. 39 til sølu.
Tlf. 317064

KNAPPATROYGGJA
myrkablá nýggj sera vøkur og hosur til mannfólkabúnan til sølu.
Tlf. 265898

TIL SØLU
Konfirmatiónsklæðir til drong bíliga til sølu. Buksur, skjúrta og butterfly.
Tlf. 321591 ella 252711

TIL SØLU
Konfirmatiónskjóli og skógvar og sandalir bíliga til sølu. Kjólin er std. 38 (Lilly Model) høgir skógvar nr. 38 og sandalir nr. 38.
Tlf. 216014

Samband

SAMBAND SØKIST
Maður, 72 ár, ynskir at koma í samband við kvinnu í sama aldri. Ger onki um tú er yngri. Er hetta nakað fyri teg, so skriva til Sosialin, Postboks 76, FO-110 Tórshavn.
Bill.mrk. 110/4

Sjavs

SJAVSKAPPING
verður á Strondum 9. mars kl. 16. Leikarar millum 4 tey bestu þørini fáa steyp til ognar.
Strálan

SJAVSKAPPING
Sjavskapping verður leygardagin kl. 16. Tilmelding ikki neyðug.
NSÍ

Súkklur

MOTORSÚKKLA YNSKIST
Motorsúkkla í prísklassanum undir 60.0000 kr. ynskist.
Tlf. 507625

MOTORCROSS TIL SØLU
Ein Derbi Senda SM, 16 mðr. gomul, sær út sum nýggj til sølu fyri 16.000 kr. ella hægstbjóðandi.
Tlf. 220355 eftir kl. 15

SKUTARI TIL SØLU
Yamaha Neos skutari til sølu, fyri kr. 15.500. Er sum nýggjur.
Tlf. 212322

YAMAHA FZR 1000
árg. 93, til sølu ella í býti við bil, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 220836

SÚKKLA YNSKIST
Dreingjasúkkla til 6-8 ár ynskist til keyps.
Tlf. 317061

PEUGEOT SKUTARI
3 ár, lítið brúktur, til sølu fyri 9.000 kr. Hjálmur og eitt dekk fylgja við.
Tlf. 251996

SKUTARI VIÐ SKAÐA TIL SØLU
Yamaha airox við skaða til sølu fyri uml. 2.000 kr.
Tlf. 317039 ella 262557

KNALLERT TIL SØLU
við nógvum eykalutum. Ring eftir kl. 16
Tlf. 222806

ER TAÐ NAKAR
ið hevur ein skutara til sølu, so vinarliga ring
tlf. 316238 eftir kl. 16

TIL SØLU
Eldri yamaha knallert við nógvum eykalutum til sølu.
Tlf. 258714

SUZUKI GSX 600F
Árg. 1989, sær gott út, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 214964

SKUTARI TIL SØLU
Gráur skutari Yamaha, JOG CS 50 frá aug. 2002. Koyrt 104 km.
Tlf. 264886

DERBI 50
Er tað onkur, ið eigur eina Cross 50 at selja mær fyri ein sámuligan pris. Ring so á
Tlf. 256878 millum 17-21

TIL SØLU
KTM knallert og tvær Rocky dreingjasúkklur við 18 gearum til sølu fyri 500 kr. stk.
Tlf. 442190

Teldur

SKERMUR YNSKIST
17" skermur til teldu ynskist til keyps.
Tlf. 317322, 228118

XBOX TIL SØLU
Xbox við DVD Remote Kit, 3 spølum, 2 game controllers til sølu fyri 2500 kr.
Tlf. 22 95 33

PLAYSTATION TIL SØLU
Ein playstation 1 við 2 joystikkum, 11 spølum og 2 nýggjum memorykortum til sølu fyri 1500 kr.
Tlf. 316422

TIL SØLU
Telduborð 60 x 110 til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 333399

PC-SPØL TIL SØLU
Arcanum, Startopia, Kahan, Comanche 4, Commandos 2, Age of Wonders 2: 250 kr. stk. Sudden Strike, Warlords Battlecry, Starcraft (+Broadway): 100 kr. stk. Diablo: 150 kr.
Tlf. 261437

TELDUSKERMUR TIL SØLU
Brúktur telduskermur til sølu, Helwett Packard Ergo 1280 upploysn, 600 x 800 60-85Hz, 1024 x 768 60-85Hz, 1280 x 1024 60-85Hz. Nevndar upploysnir eru royndar við krevjandi 3D forritum. - hvítur- prísuppskot: kr. 1900,-
Tlf. 510070

DREV TIL SØLU
Eitt M